

Í Miðstovu sótu børnini og foreldrini og máladu krukkur



Í Innistovu gjørdu tey jóladekoratiónir

# Mylnujól

**Í dagstovninum, Mylnuhúsið, hugnaðu foreldur og børn sær mikudagin, tá jólahald var á stovninum. Opið hús var fyri foreldrum og systkjum hjá børnunum**

JÓLAHALD
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:** Stovnurin hevði opið hús og nógv fólk var komið á gátt. Foreldur og børn sótu í teimum trimum stovunum og hugnaðu sær, meðan tey gjørdu ymiskt jólapryði. Í Miðstovu sótu tey og máladu krukkur, í Innistovu gjørdu tey jóladekoratiónir, meðan tey í Niðristovu, sum er vøggustovan, sótu og kliptu nissur og annað jólapryði.

Í køkinum var te, kaffi, saft og smákøkur og mandarinir afturvið.

Stuttligt var at síggja, hvussu høgt børnini gingu upp í tað, sum tey sótu og gjørdu. Og nógv vakurt prýði varð gjørt.

Hanna Thøgersen, leiðari á stovninum, sigur, at hesin hátturin at skipa fyri jólahaldið er skipaður í samráð við foreldrini.

- Vit løgdu tað út til foreldrini á einum foreldrafundi, har vit spurdu tey, hvussu tey kundu hugsað sær, at okkara jólahald skuldi verða. Og útfrá teirra svarum, komu vit so til hetta, at foreldur og børn gera jólapryði, meðan ymiskt annað sjálvandi eisini fer fram, greiðir hon frá.

Jólini á stovninum byrja av álvara Luciadagin, tann 13. desember, og so er ymiskt hugnaligt á skránni ta seinastu vikuna áðrenn jól. Stovnurin gevur eisini eitt blað út, sum eitur Mylnujól, og har kunna foreldur lesa, hvat er á skránni til jóla.

Meðan øll sótu og hugnaðu sær, bleiv ljósið sløkt og inn komu børnini í Útistovu, sum er frítíðarskúlin. Hesi børnini gingu Lucia, og tey sungu so eisini fyrsta erindi av Gleðilig jól fyri hinum. Frítíðarskúlin hjá Mylnuhúsinum húsast ikki í sama húsi sum vøggustovan og barnagarðurin, men tá jólahald er, eru øll saman.



*Ein fitt og errin genta við eini vakrari dekoratión*



*Børn og foreldur fingu rættiligt høvi at hugna sær, meðan tey hjálptust at við at gera ymiskt jólaprýði*

Tá jólahald er, verður eisini sungið nógv. Og her sluppu onkrir pápar at royna seg. Pápin hjá Nathaliu og pápin hjá Fróða settust vit gittarum, og børnini sungu av hjarta allar teir kendastu jólasangirnar.

Jólahaldið í Mylnuhúsinum endaði so við at øll slóu ring og dansaðu um jólatræið.

Onnur hava hug at undrast á, at ongin jólamaður kemur til hetta jólahaldið, men hósdagin hevur Mylnuhúsið jólafrokost við børnunum, og tá kemur maðurin í koti og svørtum knæbuksum at vitja tey.

Veðrið boðar ikki frá, at jólini eru komin, men inni í Mylnuhúsinum mikudagin var onki at ivast í, at jólini eru í hondum.



## UTTAN ÚR HEIMI

# USA vil ikki endurskoða Thule-sáttmálan

**Danskir politikarar rógva nú uppundir, at grønlendingar kanska kunnu fáa ein betri handilssáttmála við USA ístaðin fyri.**



*Colin Powell: -Tað er eingin orsøk til at endurskoða ella at broyta sáttmálan um støðina í Thule.*

Amerikanski uttanríkisráðharrin, Colin Powell, lat á einum tíðindafundi ongan iva vera um, at amerikanska stjórnin er ikki sinnað at endurskoða ella at broyta sáttmálan um herstøðina í Thule.

Á tíðindafundinum, sum var aftan á fundin millum Powell, Per Stig Møller, uttanríkisráðharra og Josef Motzfeldt, landsstýrismann, segði Powell, at stjórnin í Washington heldur onga orsøk vera til at samráðast um sáttmálan av nýggjum ella at broyta hann.

Sáttmálin, sum USA og Danmark gjørdu í 1951, krevur, at bæði londini skulu vera samd um tað, skal hann broytast, og her tykist amerikanska støðan at vera greið.

Hetta hevur fingið danskar politikarar at tosa um, at Grønland ístaðin fyri nýggjan sáttmála kann fáa betri handilssamstarv við USA, eins og onnur viðurskifti eiga at verða umrødd, sum kunnu geva grønlendingum fleiri fyrimunir.

Josef Motzfeldt segði aftan á fundin við Colin Powell, at grønlendingar halda enn fast uppá, at partarnir skulu viðgera sáttmálan av nýggjum.

# Amerikanarar krevja prógv frá Bush

**Meiri enn tveir triðingar av amerikanarunum vilja hava Bush forseta at leggja fram prógv, sum kunnu rættvísgera eitt álop á Irak.**

IRAK-KREPPAN
*Árni Joensen:*

Hóast bæði forsetin, ráðharrar og talsmenn hansara dagliga royna at sannføra amerikanarar um, at USA eigur at leypa á Irak, og hóast teir koma við nýggjum grundgevingum at kalla hvønn dag, er amerikanska fólkið framvegis ikki sannført um, at USA eigur at leypa á.

Tað sæst í einari meiningakanning, sum blaðið Los Angeles Times hevur gjørt, og sum umfatar fólk um alt USA. Ein tilsvarandi kanning í blaðnum Washington Post vísir sama úrslit.

49 prosent av teimum spurdu siga, at finna vápnaeftirlitsmenninir hjá ST eingi hópoyðingarvápn í Irak, eigur USA ikki at leypa á landið. 41 prosent siga harafturímóti, at USA eigur at leypa á kortini, og tey seinastu tíggju prosentini vita ikki, hvat so skal henda.

70 prosent av teimum spurdu siga seg hava álit á, at George W. Bush, forseti rekur tann rætta politikkin í bardaganum ímóti yvirgangi, men 63 prosent svara, at eftir teirra tykki hevur forsetin ikki lagt fram nóg góð prógv fyri, at USA eigur at leypa á Irak. Tey siga, at USA eigur ikki at fara í álop, uttan so at trygdarráðið hjá ST samtykkir, at Irak hevur gjørt so álvarssom brot á ST-samtyktirnar, at tað rættvísger eitt álop.

Kanningin hjá Los Angeles Times vísir eisini, at amerikanaska fólkið tekur ikki undir við, at USA eigur at taka Irak-kreppuna í egnar hendur. Bara 26 prosent siga, at USA eigur at leypa á Irak, sjálvt um altjóða samfelagið ikki tekur undir við tí.

Tað er eisini áhugavert, at 70 prosent av teimum spurdu siga, at leypa amerikanarar á Irak, er USA bundið at verða verandi í landinum og at byggja tað uppaftur.

## Oljuprísurin hækkar

Vandin fyri kríggi millum USA og Irak og áhaldandi ófriðurin í Venesuela gera, at oljuprísurin hækkar.

Tann seinasta mánaðin er prísurin á ráolju hækkaður umleið 20 prosent, soleiðis at á marknaðinum í Fjareystri kostar ein tunna av ráolju nú beint niðan fyri 31 dollarar, og so høgur hevur prísurin ikki verið seinastu tríggjar mánaðarnar.

Oljuhandilsmenn siga, at boðini frá amerikansku stjórnini um, at Irak hevur brotið ST-samtyktirnar, og at vápnafrágreiðingin hjá Bagdad er villleiðandi, fara uttan iva at skrúva prísin uppaftur longur upp. Harafturat kemur, at áhaldandi verkføll og mótmæli í Venesuela hava lagt ein stóran part av landsins oljuvinnu lamna, so lítil og eingin olja kemur haðani.

## Vandi fyri verkføllum

Sáttmálasamráðingarnar millum almennu arbeiðsgevararnar í Týsklandi og fakfeløgini endaðu úrslitaleysar gjáramorgunin, og vandi er nú fyri stórum verkføllum á almenna arbeiðsmarknaðinum.

Fakfelagið hjá sjúkrasystrum, sløkkiliðsmonnum og bussførarum, sum hevur meiri enn tríggjar milliónir limir, hevur kravt trý prosent afturat í løn, og at lønin hjá teimum, sum arbeiða í tí gamla Eysturtýsklandi, verður tann sama sum hjá teimum vestanfyri. Hetta kravið kann kosta ríkiskassanum 45 milliardir krónur, og hesum krøvunum hava almennu arbeiðsgevararnir víst frá sær.

Otto Schilly, innanríkisráðharri, sum sjálvur tók lut í teimum seinastu sáttmálasamráðingunum gjáranáttina, segði aftan á slitið, at tað er umráðandi hjá stjórnini at halda lønarvøkstrinum niðri. Fakfelagsumboðini søgdu, at slakar stjórnin ikki, fara tey at skipa fyri verkføllum tað mesta av januar mánað.

## Skeivur heilivágur krevur nógv mannalív

Ein frágreiðing hjá norsku heilsumyndugleikunum sigur, at umleið 1.000 norðmenn doyggja á hvørjum ári, tí teir fáa skeivan heilivág.

Frágreiðingin sigur, at lítið verður gjørt burtur úr hesum veruleikanum, sjálvt um tølini vísa, at munandi fleiri norðmenn doyggja av skeivum heilivági enn í ferðsluni. Sagt verður, at nógvir trupulleikar eru, tá avgerast skal, hvønn heilivág sjúklingar skulu hava, og at tað er neyðugt at geva fólki í heilsuverkinum betri útbúgving.

Ein onnur kanning í Noregi avdúkaði herfyri, at fimta hvørt fólk, sum doyði á sjúkrahúsinum í Akershus, høvdu fingið skeivan heilivág, og at tað var orsøkin til, at tey doyðu.

## Fekk 14 mia. krónur

Afghanski forsetin, Hamid Karzai, fór í vikuni heimaftur til Kabul eftir at hava fingið lyfti um, at tey sonevndu gevaralondini eru til reiðar at lata Afghanistan 14 milliardir krónur í stuðuli næsta ár.

Tað er á leið tað sama, sum landið hevur fingið í ár. Tað eru kortini ikki øll londini, sum hava goldið tað, sum tey høvdu bundið seg til. Sambært einari uppgerð høvdu gevaralondini goldið 73 prosent av tí lovaða stuðlinum fyri einum góðum mánað síðani.

Á fundi í Oslo samtyktu gevaralondini, at næsta ár skal peningurin fara til at beina fyri fátækradøminum í Afghanistan, at útvega bæði gentum og dreingjum skúlagongd, at bøta um vegakervið og at leggja størri dent á at útvega fólki mat. Samstundis skal størri dentur leggjast á at skipa eina løgreglu og ein her, almennu umsitingina og dómsvaldið.